## Gjørdi ongan skaða

Árstíðin við teimum tropisku stormunum og ódnunum í Meksikanska Flógvanum er byrjað, og í morgun kom tann fyrsti tropiski stormurin Claudette inn yvir amerikanska statin Florida. Sambært amerikonsku veðurstovuni var vindferðin 80 kilometrar um tíman, tá illveðrið bar við land í morgun. Frammanundan hevur Claudette ferðast tvørtur um Meksikanska Flógvan, men einki er frætt frá skaða nakrastaðni. Fleiri oljureinsiverk og gassverk eru í økinum, men sambært AP hevur illveðrið ikki ávirkað framleiðsluna har.



## Bilarnir kvala Beijing

Meðan bilasølan í londunum á okkara leiðum er minkað burtur í at kalla einki orsakað av búskaparkreppuni, keypa kinesarar framvegis bil sum ongantíð fyrr. Teir fyrstu seks mánaðirnar í ár vórðu 261.000 nýggir bilar skrásettir í høvuðsstaðnum Beijing. Tað svarar til 1.231 nýggjar bilar um dagin, og tað er níggju prosent fleiri enn somu mánaðir í fjør, skrivar Reuters. Kinesiski høvuðsstaðurin er ein tann mest dálkaði stórbýurin í heiminum, og tað kemst ikki minst av tí skjótt veksandi bilatalinum. Stjórnin hevur framt fleiri tiltøk, ikki minst í sambandi við OL í fjør.

# Hvalba




sín uppruna á Føroyabanka og tosk, sum heldur til á landgrunninum.

Tað er serliga toskurin, ið kemur av Føroyabanka, ið spenningur hevur verið um, tí hetta er ein serstakur fiskur við serliga góðum vakstrareginleikum.

Allur toskurin hjá Faroe Codfarm í Hvalba hevur sín uppruna á Føroyabanka.



*Bygningurin, sum Haldur Vang hevur keypt á Toftum, er 25x18 metrar stórur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Tað er strævið at byggja hús

**Haldur Vang, timburmeistari á Toftum, sum gjøgnum mong ár hevur bygt hús og hevur havt annað timburvirksemi, ger nú sperrur burturav. Til hetta virksemi hava teir útvegað sær serstøk amboð, og eisini hevur hann keypt virkisbygning á Toftum, so umstøðurnar nú eru nógv betri enn áður**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað krevur nógv at byggja sethús og aðrar bygningar. Tá menn koma nakað upp í árini, gerst slíkt arbeiði rættiliga strævið kropsliga.

Haldur Vang, timburmeistari á Toftum, tók fyri nøkrum árum síðan avleiðingarnar av hesum og fór sum einasti útbjóðari í Føroyum undir at smíða sperrur burturav.

- Vit eru tíggir sum eiga smápartafelagið Sp/f SperrCon. Aftrat mær, eru Petur Andersen og Rúni Leitisstein.

Haldur Vang, sum sjálvur er stjóri í felagnum, sigur, at teir í byrjanini húsaðust í leigaðum hølum í Runavík, men síðan hann í november 2008 keypti ein verkstaðsbygning á havnalagnum á Toftum, eru umstøðurnar vorðnar nógv betri.

- Sum árini ganga, og tú eldist eitt sindur, gerst tað ov strævið at smíða hús, sigur timburmeistarin, sum gjøgnum árini hevur bygt mong sethús og hevur havt nógv timburvirksemi av ymiskum slagi.

Haldur Vang, sum sjálvur eigur verkstaðsbygningin á Toftum, sigur, at nýggju hølini gera arbeiði við sperrunum nógv lættari.

- Nú kunnu vit bæði saga og samla sperrurnar samstundis. Tað kundu vit ikki í Runavík, tí pláss var ikki til tað.

Bygningurin, sum Haldur Vang keypti á Toftum í novembermánaða í fjør, er 25x18 metrar stórur.



*Sp/f SperrCon framleiðir sum einasta virki í Føroyum bara sperrur, serliga til sethúsamarknaðin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Hetta er eitt nútímans sperruvirki, har vit kunnu gera arbeiði á sløttum gólvi, sum hann tekur til. Tað er einki annað slíkt virki í Føroyum, sum burturav – og bara – fæst við at gera sperrur, serliga til sethúsamarknaðin.

Haldur vísir á, at umboðini, teir hava útvegað sær, eru nokso kostnaðarmikil, og tey eru eisini framkomin.

- Vit hava eitt nú serstøk tekniforrit og dátustýrda sag, leggur hann aftrat.

Aftrat sær hevur timburmeistarin tveir mans, sum eru við í dagliga arbeiðnum.

- Nú fólk hava verið í summarfrí hevur verið rættiliga deydligt við fyrispurningum, men vit vóna, at meira verður at gera, sum heystið líður, sigur hann.

Haldur Vang sigur, at nú so lítið virksemi hevur verið í summar, hava teir fingist við at sett bygningin í betri stand.

- Vit hava klætt bygningin innan og hava lagt hita í hann, so hann verður uppaftur betri egnaður til okkara virksemi.

Timburmeistarin sigur, at fer eftirspurningurin at veksa, sum hann hevur vónir um, er einki til hindurs fyri, at teir kunnu verða fýra mans til arbeiðis hjá Sp/f SperrCon.

- Fólk eru vælkomin at venda sær til okkara við fyrispurningum, leggur Haldur Vang, timburmeistari, aftrat.